e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

## Dráttur var drúgvari

*Flogbóltur: Dráttur vann eina spennandi og javna hálvfinalu móti Fleyr týskvøldið, og vann sær rættin at spæla móti Mjølnir í steypafinaluni*



*Tá saman um kom, vórðu tað kvinnurnar hjá Drátti, sum gjørdust tær drúgvaru í stríðnu um at vinna sær sess í steypafinaluni. Í finaludystinum skulu tær hitta Mjølnir, og verður dysturin leiktur hin 18. mars*

Sveinur Tróndarson

Dráttur-Fleyr 2-1
(15-21, 20-22
21-9, 12-21, 7-3, 15-9)

Semifinalan í steypakappingini í flogbólti fyri kvinnur varð spæld í Eysturskúlanum týskvøldið. Dysturin var millum Drátt úr Vágum og Fleyr úr Havn og hann endaði við, at Dráttur dróg longra stráið og spældi seg í finaluna, sum verður leikt móti Mjølnir 18. marts.

### Spennandi dystur

Tað var annars Fleyr, sum fekk bestu byrjanina upp á dystin og leingi sá tað út til, at tað skuldi fara vera Fleyr, sum fór at vinna dystin, men so varð ikki tá avtornaði.

Fleyr hevði annars stryrkt seg við royndum leikarum, sum hava funnið sær flogbóltsskógvarnar framaftur. Katrin Høgnesen, Guðrun Jensen og Kristina Ejdesgaard vóru við á liðnum hjá Fleyr, men tað var ikki nóg mikið kortini.

Sum sagt vóru tað havnargenturnar, sum byrjaðu best og tær vunnu fyrsta settið rættuliga greitt. 21-15 stóð á stigatalvuni tá liðugt var.

Í øðrum setti kláraðu vágagenturnar betri at fylgja við, og tað var um reppið, at tær fóru við settinum, sum var sera javnt. Kortini eydnaðist tað enn einaferð Fleyr at hava munin og aftaná at hava vunnið 22-20 fóru tær til hálvleiks við leiðsluni.

### Dráttur koma aftur

Í triðja settið kom vend í. Dráttur broytti eitt sindur upp á uppstillingina og tað hjálpti. Tær fóru skjótt frá Fleyr og smurdu tær av í triðja settinum. Settið endaði 21-9 og nú var vent í holuni.

Men sum so ofta fyrr, so vendi tað aftur beinanvegin. Fleyrkvinnurnar vildu ikki hava sitandi á sær, at tær høvdu tapt so stórt og við skilagóðum spæli vunnu tær fjórða sett 21-12.

Nú var javnt í øðrum hálvleiki og javnbrótari mátti til fyri at avgera seinna hálvleik. Hóast ein skuldi trúð, at Fleyr var omaná nú, so vístu vágagenturnar viljastyrki og tær gjørdu bart við at vinna javnbrótaran um annan hálvleik 7-3.

Nú var javnt 1-1 og tann seinasti javnbrótarin mátti takast við fyri at finna eina vinnara og ein finalist.

Hesaferð var tað Dáttur, sum var væl stinnari og tær vunnu seinasta javnbrótaran 15-9 og dystin 2-1.

### Uppiborið

Tað var stór frøði á gentunum úr Vágum tá tær høvdu vunnið sær sess í finaluni. Sigurin var eftir tí vit hava skilt uppiborin og serliga vóru tað Helga Nordendal og Gerda Nattestad, sum vóru drúgvar hjá Drátti.

Munurin millum liðini var, at Dráttur dugdi betri at fáa burtur úr á miðjuni, meðan Fleyr hevði sera trupult at byrgja upp fyri hesum vápninum.

Fleyrgenturnar vóru, sum vera mann sera vónbrotnar um tapið, tí tað hevði bjargað teimum ein part av kappingarárinum, um so var, at tær høvdu spælt seg í finaluna.

Finalan verður sum sagt millum Mjølnir, sum hevði vunnið sær hitt plássið fyri langt síðani, og Drátt, og hon verður spæld í Havn tann 18. marts, sama dag, sum menninir spæla sína finalu. Tann dysturin verður millum stórfeløgini bæði Mjølnir og Fleyr.

Vit gleða okkum til dystirnar ...

**Støðan, 1. deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 6 | 6 - 0 - 0 | 459 | 356 | 103 | 21 |
| 2 VÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 380 | 339 | 41 | 13 |
| 3 Kyndil | 6 | 3 - 0 - 3 | 382 | 342 | 40 | 13 |
| 4 Neistin | 5 | 3 - 0 - 2 | 320 | 321 | -1 | 11 |
| 5 VB | 5 | 1 - 0 - 4 | 375 | 392 | -17 | 6 |
| 6 Tjaldur | 5 | 0 - 0 - 5 | 268 | 434 | -166 | 0 |



*Venjari hjá A-landsliðnum er Palli Joensen*

## Hálv onnur vika eftir

*Nú fer at styttast til A-landslið okkara aftur skal royna seg í altjóða dysti*

Jákup Mørk

Fyrsta vikuskiftið í mars mánaði kemur grønlendska manslandsliðið á vitjan, og skulu teir á ferðini leika móti nýstovnaða føroyska A-landsliðnum.

Varði
Hesin dystur verður samstundis eitt slag av varða í føroyskari hondbóltssøgu, við tað at hetta samstundis markerar, at nú er aftur um at koma ferð landsliðsarbeiðið hjá Hondbóltssambandinum.

Hetta datt jú fullkomuliga niðurfyri, eftir at HSF í sínari tíð var um at fara av knóranum, men seinnu árini er ein varlig menning farin fram, her yngru leikararnir hava umboðað Føroyar í altjóða kappingum.

Tað er tó ikki nóg mikið, bert at hava U-landslið, og tí er tað gleðiligt, at vit nú aftur fáa A-landslið okkara at síggja.

Um og hvussu langt Føroyar eru dragnaðar í altjóða høpi seinnu árini, fáa vit helst eina ábending um, nú grøndlendska landsliðið kemur higar.

### Ung hondbóltstjóð

Grønlendska landsliðið hevur nevnliga longu havt fleiri altjóða uppgávur, hóast teir enn eru sera ungir í hesum høpi.

Tað eru bert tvey ár síðani, at teir fingu limaskap í altjóða hondbóltssamgonguni, IHF, og hava teir síðani hetta leikt 15 landsdystir, harav sjey teirra eru endaðir við grønlendskum sigri.

Av altjóða dystunum, sum teir higartil hava leikt, kann nevnast, at teir hava tapt ruddiliga móti Danmar, Argentina og Brasil, meðan teir hinvegin vóru sera nær við, tá teir leiktu móti ávíkavist Hvítarusslandi og Estlandi.

Júst hvussu grønlendski hópurin er settur saman vita vit ikki, men hondbóltssambandi hevur so fingið upplýst nøvnini á teimum, sum hesi bæði árini hava mannað grønlendska liðið, og eru hesir: Kim Hougaard (SAK), Hans Alaufesen, (SAK), Hans Peter Poulsen (NÛK), Peter Frederik Olsen, (NÛK), David Fisker, (NÛK), Carsten Olsen (NÛK), Finn Nielsen (Nûk), Peter Sikemsen (GOG), Bremen (Odense HF), Jakob Larsen (Nyborg, GOG), Ivik Ostermann-Knudsen (Nyborg), Rasmus Larsen (Nyborg, Gudme), Arent Olsen, (Helsingør If), Karl Davidsen (Helsingør), Hans Peter Kyed (Casino Bregenz í Eysturríki), Hans Knudsen (K1933), Anders Heilmann (Lyngby), Malik Duelund (Bolbro), Johan Rosbach (OH77), Ulrich Winther-Hansen (IP85, Otterup)



# Seinasti spenningurin fór

*Hondbóltur, kvinnur: Við greiða sigrinum á Kyndli týskvøldið, beindi Stjørnan allan iva av vegnum. Vegurin til meistaraheitið liggur nú víðopin, og meira enn vanligur kleyvarskapur skal til, um Klaksvíkin skal missa væntaða FM-heitið, nú teimum bert restar fýra dystir*



*Joan og Simona vóru við yvirlutan í samfullar 60 minuttir, men kyndilskvinnurnar stríddust alla tíðina fyri at venda dystinum*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

Jákup Mørk

Stjørnan-Kyndil 26-20
(15-10)

Tá Kyndilsleikararnir týsdagin fóru til Klaksvíkar, vóru tær ivaleyst væl vitandi um, at hetta so avgjørt var seinasta útkall, um tað skuldi eydnast at gera nakað sum helst við bjørtur FM-vónirnar hjá klaksvíkingum.

Undan dystinum vóru nevnliga seks stig á muni millum liðini bæði, og hóast ein kyndilssigur í sær sjálvum ikki vildi ført til so øgiliga nógv, so kundi hetta møguliga skapt eitt sindur av øsing millum stjørnuleikararnar, soleiðis at tær møguliga eisini snávaðu í onkrum øðrum av seinastu dystunum.

Sum tølini benda á, so eydnaðist tað kortini ikki Kyndli at taka hetta takið, men áðren tær høvdu givið skarvin yvir, vóru tær annar parturin í

### Ov stóra virðing

Fyrstu løtuna var tó ikki nógv, sum bendi á, at so skuldi verða, tí so at siga allan fyrra hálvleik høvdu kyndilsleikararnir alt ov stóra virðing fyri mótstøðuliðnum.

Sjálvandi er alneyðugt, at leikararnir altíð hava virðing fyri mótstøðuliðnum, men munurin millum hetta og ræðslu er rættuliga stórur.

Hetta viðførdi eisini, at leikararnir aloftast stóu og bíðaðu eftir, at eitthvørt skuldi henda, og tískil endaðu flestu álopini við, at ein hálvhjartað skotroynd varð send móti Johannu, sum sjáldan hevði trupulleikar av hesum.

Eisini sást hetta aftur í verjupartinum, har flestu kyndilsgenturnar tóktust vera alt ov passivar, tá stjørnuliðið var í álopið. Eitt nú slapp Simona rættuliga ótarnað at skjóta fleiri ferðir, har verjan átti at verið skjótari úti, og tá Simona fær somikið góðar sømdir, er ikki nógv at gera hjá málverjanum.

Esini kom fleiri ferðir fyri, at stjørnan við sera simplum spæli leikti seg ígjøgnum kyndilsverjuna, soleiðis at leikarar gjørdust óvanliga fríar mitt fyri.

Heldur ikki hevði Marita Hermansen ein av sínum bestu døgum í málinum, og tað tóktist vera kærkomin hvíld hjá henni, tá Elin Michelsen móti endanum av fyrra hálvleiki avloysti hana.

Hóast munurin ikki vaks so øgiliga nógv, eftir at Stjørnan fyrsta korterið hevði vunnið sær eina fimm mála leiðslu, so kundi tað gingið nógv verri hjá Kyndli. Álopsspælið hekk framvegis illa saman, og hvørki Lotte, Ann ella Jórun fingu skotini at sita, har tær vanliga royna at seta tey.

Ikki tí, onkuntíð vóru flottar detaljur at síggja, m.a. einar tvær fríspælingar til Jensiu, men hetta var alt ov sjáldan til at gerast verulig hóttan móti stjørnumálinum.

### Ferð og megi í seinna

Nú veit eg sjálvsagt ikki, hvat venjararnir hjá liðunum báðum hava nýtt hálvleikin til, men í hvussu so er, so var himmalvíður munur í spælinum fyrru og seinnu tríati minuttirnar.

Kyndilskvinnurnar vóru nú nógv grammari enn tær høvdu verið, og í málinum hevði Marita brádliga fleiri góðar bjargingar, og millum annað brendi Stjørnan tvey brotskøst í byrjanini av hálvleikinum.

Í álopsspælinum var eisini sjónligt, at nógv meira vilji var í bæði gjøgnumbrots- og skotroyndum.

Stjørnuleikararnir settu tó á ongan hátt ferðina niður, men royndu framhaldandi at kvala kyndilsleikararnar við skjótum og kraftmiklum spæli. Kyndilsverjan var tó nógv betur skipað seinastu 30 minuttirnar, og satt at siga, so kundu tær við eitt lítið sindur av hepni (ella minni óhepni) komið heilt nær stjørnuliðnum. Lotte Sørensen, sum varð mansvard stóran part av seinastu 30 minuttunum, tóktist nú vera nógv betur fyri, og brádliga kom eisini meira ferð á skotini hjá Jórun.

Mariginalarnir vóru tó ikki við grønu leikarunum, og ístaðin kundi heimaliðið dúva upp á, at tær í Vesnu Tomajek eiga ein av allarbestu leikarunum her á landi. Stjørnan fekk ellivu mál seinna hálvleik, og av hesum fekk leikandi venjarin, hóast hon varð mansvard í stórum pørtum av dystinum, ikki færri enn sjey, og hetta var kanska størsta orsøkin til, at kyndilsliðið ongantíð kom nærri Stjørnuni enn fýra mál.

### Undirhaldandi 30 minuttir

Sum nevnt omanfyri, so var hesin seinni hálvleikurin ein av teimum bestu, sum hava verið leiktir í kvinnuhondbólti her heima. At tað ikki komu fleiri mál, komst snøgt sagt av, at serliga kyndilsleikararnir í nógvum førum vóru óhepnar í skotroyndum sínum, umframt at liðini bæði løgdu nógvu orku í verjupartin.

Hóast leiðslan hjá Stjørnuni ongantíð minkaði nevnivert, so fór nervin ongantíð úr dystinum, og intensiteturin í spælinum var alla tíðina sera høgur, og fleiri ferðir var kanska um at gerast ov heitt á vøllinum.

Heilt áfast gjørdist tó ongantíð, og ístaðin fyri bardaga, kundu nógvu áskoðararnir heldur frøast um ein sera spennandi seinna hálvleik, har leikarar á báðum liðum góvu alt tað, tær orkaðu.

Eftir at seinasta ýlið hevði ljóðað úr hátalaranum, kundu tær á heimaliðnum fegnast um sigurin. Ein sigur, sum hóast alt var væl uppiborin, og sum viðførdi, at klaksvíksgenturnar tóku enn eitt risafet mót føroyameistaraheitinum. Stjørnan er nú heili átta stig framman fyri næsta mótstøðuliðið, og tað skal ganga verri enn av skriðuni til, um FM-heitið ikki skal enda í Klaksvík

Kyndilskvinnurnar noyðast nú at ásanna, at teirra leiklutur í FM-stríðnum er útspældur, men tær hava tó framvegis silvurmerkini at stríðast fyri

### Áskoðararnir

At enda kann eg ikki bara mær fyri at koma við eini lítlari viðmerking um áskoðarnar, sum hetta týskvøldið vóru heili 400 í tali.

Lat tað verða sagt beinanvegin, at stemningurin, sum týskvøldið var í høllini, var ótrúliga góður, og tað er altíð eggjandi hjá hjá leikarunum á vøllinum at spæla undir slíkum umstøðum.

Nøkur lýti vóru tó, tí summi av teimum rópum, sum vóru at hoyra týskvøldið, hoyra als ikki heima á einum ítróttarvølli, ella nakra aðra staðni, og har umframt sømir tað seg ikki serliga væl, at hallarvarparin rópar við í mikrofonini, tá áskoðarnir hjá heimaliðnum heppa leikarar sínar.

Verður sæð burtur frá hesum, varð talan leygardagin um dyst av teimum heilt góðu, har ytru karmarnir eisini gjørdu sítt til, at dysturin gjørdist so undirhaldandi

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Vesna Tomajek 11 (2), Simona Hansen 5, Annika Ljósstein 3, Joan M. Joensen 2, Anna K. Samson 2, Una Olsen 2, Andrijana Milodanovic 1
Kyndil: Lotte Sørensen 7 (3), Jórun Ludvig 5, Jensia Petersen 4, Ann Hansen 2, Rakul Joensen 2
**Brotskøst:**
Stjørnan 4, Kyndil 3
**Útvísingar:**
Stjørnan 2, Kyndil 3
**Dómarar úr StÍF:**
Poli Hansen og Alexandur Johansen



*Í seinna hálvleiki sýndi leikandi venjarin hjá Stjørnuni, Vesna Tomajek, hví hon telist millum bestu leikararnar her á landi*

**Mynd: Álvur Haraldsen**